# Skipan av Listaráðnum

Listaráðið verður skipað við einari nevnd við 5 limum og einum skrivara. Starvsskipanin kann verða hin sama sum hon er í dag, har MMR velur formann og næstformann, og LISA velur 4 limir. Skrivarastarvið er fulltíðarstarv.
Samsýningin til formannin skal vera ein ásett mánaðarlig upphædd og má svara til arbeiðsbyrðuna og til hvat aðrir slíkir formanssessir geva.

Landsstýriskvinnan/maðurin í mentamálum.

Mentamálaráðið-Mentamáladeildin.

Heimasíða; online-umsóknir, hagtøl, kunning.

Umsóknir/umsøkjari.

## Virðislønir

Listaráðið umsitur **Mentanarvirðisløn Landsins og Heiðursgávur Landsins.**
Herundir eisini Sømdarpening og Lønartrygd.
Listaráðið og umboðini fyri Listanevndirnar gera í felag av, hvør fær MVL og HGL og gera tilmæli til landsstýrismannin/kvinnuna. Fyri MMR er deildarstjórin/fulltrúin
umboð í tilmælisnevndini. Fastur dagur skal ásetast fyri nær landsstýrismaðurin handar virðislønirnar.

## Umsóknir

Umsóknir til **starvslønir, íverksetanarstuðul, stuðul til børn og ung, orðabókagerð, ferðastuðul (myndlist)** og **vanligar verkætlanir og tiltøk** verða allar sendar meginskrivstovuni fyri Listaráðið. Umsóknirnar verða síðan latnartil tær ymisku listanevndirnar, og hesar gera tilmæli. Tilmælini verða viðgjørd í Listaráðnum, og endalig avgerð verður tikin har. Fyri at lætta um arbeiðsbyrðuna er ein møguleiki at fastseta ymiskar freistir fyri tær ymisku umsóknirnar, soleiðis at virksemið verður spjatt alt árið.

## Mentanarlig tiltøk og verkætlanir

Umsóknir til **mentanarlig tiltøk og verkætlanir**, sum ikki verða lagdar fyri listanevndirnar verða viðgjørdar av nevndini fyri Listaráðið.

## Bókmentanevndin

*Manning:* Bókmentaumboðið í Listaráðnum (valt av LISA), umframt tvey umboð frá bókmentafeløgum/umhvørv-inum, t.d. eitt umboð fyri Rithøvundafelagið og eitt umboð fyri týðingar/yrkisbókmentir/orða-bókagerð.
*Nevndin* tekur sær av spurningum viðvíkjandi bókmentum bæði heima og heiman.
Nevndin ger tilmæli til Listaráðið um stuðul og upphæddir.

## Leiklistanevndin

*Manning:* Leiklistaumboðið í Listaráðnum (valt av LISA), umframt tvey umboð frá leiklistafeløgum/umhvørv-inum, t.d. eitt umboð fyri yrkisleiklistina (Tjóðpall Føroya), og eitt umboð fyri amatør-leiklistina/filmlistina.
*Nevndin* tekur sær av spurningum viðvíkjandi leiklist bæði heima og heiman. Nevndin ger tilmæli til Listaráðið um stuðul og upphæddir.

## Myndlistanevndin

*Manning:* Myndlistaumboðið í Listaráðnum (valt av LISA), umframt tvey umboð fyri visuella list, t.d. eitt fyri myndlistaumhvørvið og eitt fyri unga myndlist t.d.
*Nevndin* tekur sær av spurningum viðvíkjandi myndlist bæði heima og heiman.
Nevndin ger tilmæli til Listaráðið um stuðul og upphæddir.

## Tónlistanevndin

*Manning:* Tónlistaumboðið í Listaráðnum (valt av LISA), umframt tvey umboð vald av tónleikafeløgum/umhvørvinum, t.d. eitt umboð fyri klassiska/nútímans tónleik og eitt fyri rútmiskan tónleik.
*Nevndin* tekur sær av spurningum viðvíkjandi tónlist bæði heima og heiman. Nevndin ger tilmæli til Listaráðið um stuðul og upphæddir.